# Vit skulu vera takksom fyri okkara aldur

**Pensjónistar skulu vera takksamir fyri sín aldur. Men teir mugu sleppa at liv. Ein máti, at gera lívið liviligari, er at geva pensjónistum avsláttur til mentanarlig tiltøk og til Rúsuna**

PENSJÓNISTALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Kemur ongin aldur, er heldur onki lív.

Við hesum orðum skeyt Sune Joensen, formaður í pensjónistafelagnum í Havn, árið hjá pensiónistunum ígongd

Virksemið hjá pensónistafeløgunum er nógv størst um veturin, tá ið tey hittast regluliga, og nú eru tey so farin undir veturin.

Startskotið til veturin varð latið av í Losjuni nú eitt kvøldið, har einir 70-80 pensónistar hittust til hugnaliga samveru, og har tey fingu ein góðan bita, sungu felagssang aftur við harmonikuni hjá Knúti Olsen, og har tey hugleiddu um lívið sum pensjónistur.



*- Er ongin aldur, er heldur onki lív, so einfalt er tað, staðfesti Sune Joensen, formaður í pensónistafelagnum í Havn, tá ið hann skeyt virksemiðsárið hjá teimum ígongd á hugnaligari samkomu í Losjuni herfyri*

Sune Joensen helt fyri, at tað er sjálvandi spell, at sjúka nívir hjá summum pensjónistum.

Men hann helt kortini, at pensjónistar eiga at vera takksamir fyri aldurin, tí er ongin aldur, er heldur onki lív, so einfalt er tað.

Í hesum sambandi fortaldi hann eina søgu um eina gamla konu, sum hevði sent boð eftir lækna, tí hon føldi seg ikki væl.

- Ja, eg fái so ikki gjørt tygum yngri, helt læknin fyri.

- Tað var heldur ikki tað, eg sendi boð eftir tær til, svaraði konan hvassliga.

Men so legði hon afturat: Tú hevur bara at gera meg eldri!!

Formaðurin í pensjónistafelagnum helt, at hetta vóru skilaorð, sum tað var vert at leggja sær í geyma.

Hetta er ein øðrvísi útgáva av gomlu fyndarorðunum um, at tað er ikki lætt at verða gamal, men tað er bara eitt alternativ, og tað er altso uppaftur verri.....

Sigvald Kristiansen, sum er nevndarlimur í landsfelagnum hjá pensjónistunum, segði, at tað er gott og hevur stóran týdning fyri eldri fólk, at pensjónistafeløgini eru til.

Hann staðfesti, at tað er ikki neyðugt hjá eldri fólki at sita heima og kúra, tí tað er altíð nógv at fara til.

Nú liggur eisini væl fyri at ferðast, og Sigvald hugleiddi um munin, sum var á nú, og tá ið hann var óviti og ungur.

- Fyrstu ferð, eg var í Havn, var eg 12 ára gamal og fyrstu ferð, eg var av landinum, var eg 20 ára gamal.

Og hann var 70, fyrstu ferð, hann var í USA.

- Nú hava vit ommu-og abbabørn, sum hava verið í fleiri londum í Evropa og í USA, longu áðrenn tey eru farin í skúla.

## Bíligari atgongd til mentan

Sigvald Kristiansen segði, at tað er ikki nøktandi, at eldri fólk bara hava nóg mikið av pengum til at yvirliva.

- Vit skulu eisini hava umstøður til at liva eitt lív, sum hevur meiri at bjóða enn mat og klæðir og tak yvir høvdið.

Eitt nú skulu vit hava umstøður og ráð at ferðast og at fara til tiltøk av ymsum slagi.

Men hann saknaði, at pensjónistar ikki fáa bíligari atgongd til mentanartilboð av ymsum sløgum.

Einaferð, hann var í London við einum ferðalagi, fingu eldri yvir 60 ár, 40% í avsláttri av atgongumerkinum.

- Tað hevði verið eitt hugskot at sett í gildi her í Føroyum eisini, so at pensjónistar kundu farið til konsertir, sjónleikir og mentanarlig tiltøk av ymsum slagi, uttan at hugsa um at hava ráð til tað, helt Sigvald Kristiansen.

Hann legði afturat, at Landsfelagið hjá pensjónistunum fer at taka málið upp í eini roynd at fáa pensjónistum avsláttur, tá ið teir fara til mentanarlig tiltøk.

## Avsláttur í Rúsuni

Finnur Johansen, nevndarlimur í pensjónistafelagnum legði afturat, at hann kundi hugsað sær, at pensjónistar eisini fingu avsláttur í Rúsuni.

Hann hevði einaferð sæð eina lýsing, har ein stórur handil uttanlands hevði ymisk tilboð til viðskiftafólkini, men viðskiftafólk í ymsum aldursbólkum fingu ymisk tilboð.

- Soleiðis fingu ung húski við børnum tilboð upp á blæur, og pensjónistar fingu tilboð upp á vín.

Tað kundi hann eisini hugsað sær varð sett í gildi í Føroyum.

- Tað er ikki fyri at gera nakrar ónáðir, men tað er bara, fyri at vit fáa betri umstøður at liva lívið og at hava tað gott og stuttligt, segði Finnur Johansen.





*Men tað verðsliga verður heldur ikki gloymt og hetta kvøldið manglaði onki*